HB-EB/Sreymur 1-2 (1-1):

# Sundalagið søguligan sigur



*EB/Streymur gjørdist føroyameistarar í unglingadeildini*
*Standandi frá vinstru: Magnus á Stongum, venjari, Marni Djurhuus, Edvard Pauli Andreasen, Karl Johan Djurhuus, Búgvi Øster, Eirikur Jacobsen, Brian Olsen, Bárður Olsen, Janus Haraldsen og Niels Andreasen.*
*Húkandi frá vinstru: Rólant Waag Dam, Jens Tonny Øssursson Egilstrøð, Arnbjørn T. Hansen, Jógvan Andreas Joensen, Leif Niclasen, Brian Hansen og Tonny S. Kruse*

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð eydnaðist tað unglingunum hjá EB/Streymi, sum hava manning úr Vestmanna og til Eiðis, at ogna sær meistaraskapin**

FM FYRI UNGLINGAR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fótbóltslagið í Sundalagnum og í bygdunum har á leið er gott, og spenningurin er, sum hann ongantíð hevur verið áður. Mánakvøldið var EB/Streymur í 1. deild við stórum fylgi á Svangaskarði, og tá lagaði tað seg soleiðis, at teir nú leygardagin hava møguleika at vinna fyrstu bronsumerkini nakrantíð. Um tað fer at eydnast, verður avgjørt í morgin, tá ið Skála fer at vitja á Mølini.

Mikukvøldið vóru unglingarnir hjá EB/Streymi á Svangaskarði. Har spældu teir FM finalu móti HB, sum plagar at vinna nógv. Heimafylgið hjá EB/Streymi var upp ímóti teimum hundrað ella kanska meiri enn fýrafalt áskoðaratalið hjá HB.

Tað sást beinanvegin, at EB/Streyma menninir vóru ógvuliga uppsettir, og at tað fór at verða torført hjá HB, sum hevði fýra á liðnum, ið hava roynt seg á meistaraliðnum í 1. deild, at fóta sær.

Men tað eydnaðist HB at seta hol á, tá ið eitt stórt korter var farið. Rókur Jespersen umsetti úr ellivu metrum, eftir at dómarin hevði brikslað fyri brotssparki, sum EB/Streymur ongantíð átti at havt gjørt.

Teir á samansetta liðnum góvust ikki. Teir spældu væl og ágrýtið, og eftir stóran hálvan tíma eydnaðist tað Arnbjørn T. Hansen at javna, eftir at Búgvi Øster hevði sneitt seg ígjøgnum í høgru og lagt innfyri.

Støðan helt sær til tað restaðu tjúgu minuttir. Í 2. hálvleiki gekk nokk so nógv fyri seg á helvtini hjá EB/Streymi, men Brian Hansen í EB/Streyma málinum varð ikki ofta settur á serligar royndir. EB/Streymur var fleiri ferðir framvið. Tróndur Kragesten í HB málinum hevði góða bjargging, og Arnbjørn T. Hansen hevði fínan stútara á tvørtræið aftanfyri HB málverjan.

Sigursmálið skoraði Tonni Kruse við góðum langskoti, ið fór uppum málverjan og dúkkaði dygst undir tvørtræið. Síðstu løtuna royndi HB at trýsta, men teir komu ikki til upplagdar møguleikar. Miðverjan stóð stinn, allir stríddust sum leyvur, og tá ið Dagfinn Olsen hevði brikslað fyri síðstu ferð, og Karl Vidtfeldt handaði steyp og gullkrónur til vinnararnar, var fagnaðurin ógvuliga stórur.

Men á Eiði og har á leið høvdu tey ikki stundir at gera nakað serligt burturúr mikukvøldið. Í gjárkvøldið skuldi 3. deildarliðið spæla útsetta dystin á Svangaskarði, og leygardagin fer slagið at standa á Mølini móti Skála.

### Nógvar bygdir

Magnus á Stongum, kommunulæknin á Eiði, sum eisini er limur í FSF nevndini, hevur verið venjari hjá vinnandi liðnum, síðani teir vóru smádreingir. Hann letur væl at huginum at dríva á og venja, og tað er eyðsýnt, at fótbóltsevnini eru góð. Í fjør taptu teir steypafinaluna móti GÍ og FM finaluna móti HB.

– Hetta liðið hevur nógvu tey seinastu árini vunnið heiðursmerkir. Sum oftast hevur HB verið best, men mikukvøldið fekk eg skjótt kensluna av, at hetta kundi gerast okkara dagur. Teir vóru brandar. Stríddust nógv og spældu væl, og tað sigur seg sjálvt, at vit unna teimum so hjartaliga, at tað loksins eydnaðist teimum at vinna gull.

Tað kann ikki sigast annað, enn at hetta liðið er gott dømi um, hvussu væl tað kann hilnast, tá ið fleiri bygdir, sum ikki sjálvar megna at manna lið, finna saman. Niels Andreasen og Karl Johan Djurhuus eru úr Vestmanna, Jákup Andreas Joensen er úr Kvívík, Marni Djurhuus, Búgvi Øster og Arnbjørn T. Hansen eru úr Kollafirði, Eirikur Jacobsen úr Hósvík, Brian Hansen úr Hvalvík, Brian Olsen og Edvard Pauli Andreasen eru úr Tjørnuvík, Bárður Olsen er úr Vík, Rólant Waag Dam og Leif Niclasen eru av Norðskála, og Jens Tonny Egilstrøð, Janus Haraldsen og Tonni Kruse eru av Eiði.

Í 1994 vóru fýra av dreingjunum við til at vinna FM í smápiltadeildini fyri Streym. Teir vóru Marni Djurhuus, Búgvi Øster, Arnbjørn T. Hansen og Bárður Olsen. Saman við teimum vóru eitt nú Gert Hansen og Hans Pauli Samuelsen, sum nú eru ov gamlir til unglingaliðið.

Í 2000 og í 2001 vann EB/Streymur FM fyri piltar á hálvum vølli. Sjey av teimum, sum mikukvøldið vunnu FM fyri unglingar kunnu halda fram í deildini næsta ár. Magnus á Stongum ivast ikki í, at EB/Streymur eisini næsta ár fer at hava lið í unglingadeildini. Talan verður um gott fótbóltslið, men hann torir ikki at siga, at teir fara at vera við í FM kappingini longu næsta ár aftur, tí miðalaldurin verður nakað lágur.

– Men vit eiga nógvar ungar spælarar, sum fara at gera um seg komandi árini, staðfestir unglingavenjarin. Sosialurin ynskir honum og EB/Streyma unglingunum og øllum teimum omanfyri nevndu bygdunum og øllum hinum – eitt nú við Gjógv, á Oyrabakka og Oyri – sum taka á við EB/Streymi, tillukku við fyrsta meistaraheitinum nakrantíð í unglingadeildini.

**HB-EB/Streymur 1-2 (1-1)**
1-0: Rókur Jespersen (br.), 17
1-1: Arnbjørn T. Hansen, 32
1-2: Tonny Kruse, 71



# Góður dagur hjá føroysku feløgunum

**Tey trý feløgini, sum hava føroyingar í hópinum, megnaðu øll at spæla seg víðari í steypakappingini**

DANSKA STEYPAKAPPINGIN

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Talan var um góðan dag hjá føroysku feløgunum í næstbestu donsku deildini, tá ið fjórða umfarið í steypakappingini var á skránni mikukvøldið.

Fremad Amager vann 3-2 á heimavøllinum, sum hesa ferð var í Tårnby og ikki Sundby, har einki ljósanlegg er. Í steðginum sá einki út, tí tá var Fredericia frammanfyri 2-0. Í 2. hálvleiki skoraði Fremad Amager trý mál. Andrew av Fløtum var á vøllinum í 1. hálvleiki, men hann kom ikki innaftur eftir steðgin. Hinir báðir føroysku spælararnir hjá Fremad Amager eru framvegis heilt uttanfyri hópin.

Felagið hjá Johan Byrial Hansen, Horsens, átti heimavøll móti superligufelagnum Silkeborg. Gestirnir vóru tvær ferðir á odda, men Horsens vann 4-3. Tá ið vanliga leiktíðin var farin, var støðan 2-2. Sigursmálið varð skorað í 102. minutti.

Felagið hjá Jón Róa Jacobsen vann á heimavølli 3-0 á superliguliðnum hjá Randers. Gestirnir mistu ein mann í 17. minutti. Brotsspark varð dømt, tí hann á strikuni hevði bjargað við hondini. Frem misnýtti brotssparkið, men longu undan steðginum høvdu teir skorað tey trý málini, sum bóru tryggan heimasigur við sær.

Jón Rói var á vøllinum allar 90 minuttirnar, og í Frem siga tey, at miðverjan enn eina ferð stóð seg ógvuliga væl.

Fimta umfarið verður 27. oktober. Lutakast var í gjár. Hjá føroysku feløgunum fall luturin soleiðis: Frem-Skjold, Fremad Amager-FC Nordsjælland, Horsens-AaB og FCK-OB. Harafturat er tað áhugavert, at oddaliðið í superliguni, Brøndby, skal spæla í Esbjerg.

# Fótbóltsdansur í Fuglafirði

**Leygarkvøldið verður árligi fótbóltsdansurin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Dansurin setir punktum fyri eitt langt kappingarár**

Í nógv ár hevur tað verður afturvendandi tiltak, at eitt serligt dansitiltak er, tá seinasta umfar í fótbóltskappingini verður spælt.

Soleiðis verður aftur í ár, tí leygardagin verður seinasta vanliga umfarið í kappingini spælt, og leygarkvøldið er dansur í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Tað er GÍ, sum skipar fyri tiltakinum, og tað hevur felagið gjørt í nógv ár. Fyrstu árini var dansurin í ítróttarhøllini á Kambsdali, men nú er samstarv við Mentanarhúsið í Fuglafirði.

Tað plagar at vera gott lag á fólki til hesi tiltøkini, og fótbóltsspælarar fáa høvi at taka sær av løttum, eftir eitt langt og strævið kappingarár. Vanliga koma fótbóltsspælarar úr allari Eysturoynni til dansin.

### Showmenn spæla

Tað verður helst besti dansibólkurin í løtuni, Showmenn, sum fara at spæla til dansin.

Nakrir av teimum mest royndu føroysku popp- og rocktónleikararnir manna bólkin, og tað er ein fragd at hoyra, hvussu væl samanspældir teir eru.

Kim Hansen er oddamaður í bólkinum, men hinir tónleikarar hava allir stóran týdning fyri tónleikin og framførslurnar, og teir duga sera væl at supplera hvønn annan á pallinum.

Her er veruliga talan um dygd, og bólkurin spælir bæði sangir, sum limirnir í bólkinum hava skrivað, og sangir hjá øðrum. Teir fevna sera breitt, og teir duga altíð at máta hitan millum fólkið og geva teimum tað, sum tey næstan bara kunnu droyma um at fáa frá øðrum bólkum.

Showmenn eru Kim Hansen (Sang og ljómborð), Johannus á Rógvu Joensen (bass), Jens Marni Hansen (gittar) og James Olsen (trummur).

Teir hava havt ein lítlan steðg seinnu vikurnar, men fara nú afur at spæla.




